# a til handils




- Tað er fínasta slagi at vit nú hava fingið handil aftur, sigur Maria Jacobsen á Viðareiði



*Tveir av kundunum hava sett seg í hugnakrókin við einum kaffimunni. Teir báðir tosa helst um nýggja sjónleikin, sum klaksvíkingar eru farnir undir at venja. Hava teir einki at tosa um, kunnu teir altíð njóta vakra útsýnið vestureftir*

*Her fáast vanligar gerandisvørur, gávulutir, nýbakað rundstykkir og fransbreyð og køkur, ið Óluva bakar. Tær einastu vørurnar, ið hon ikki bakar sjálv, eru rugbreyðini!*

# Bakar alt sjálv

Handilin hjá Óluvu Frederiksen læt upp leygardagin 19. juli.

Her fáast vanligar gerandisvørur, gávulutir, nýbakað rundstykkir og fransbreyð og køkur, ið Óluva bakar. Tær einastu vørurnar, ið hon ikki bakar sjálv, eru rugbreyðini!

Nú er hálvar annar mánaður farin síðani, og kann hon við takksemi staðfesta, at bygdarfólkið hevur tikið sera væl ímóti handlinum.

- Eg haldi, at øll eru fegin um handilin, serliga tí at hann er opin so langt út á kvøldið, sigur hon.

Sum ein part av handilsvirkseminum er somuleiðis møguleiki hjá fólki at keypa sær ein kaffimunn og njóta tað í einum hugnakróki við stórum vindeygum innast í handlinum.

Hetta hevur verið eitt sera nógv nýtt stað hjá ferðafólkum, ið her hava møguleika at njóta eitt tað vakrasta útsýnið í landinum – yvir kirkjuna, bygdina Múla, fjøllini og flógvan vestureftir.

Tey ungu hava eisini møguleika at keypa sær okkurt til matna, og kann hetta somuleiðis njótast afturvið góðum útsýni.

Handilin hevur higartil verið opin frá klokkan 9 til 22, allar dagar uttan sunnudag. Kanska okkurt verður broytt í hesum sambandi í vetur.




*Óluva Frederiksen bakar meginpartin av bakaravørunum sjálv. Hesir báðir viðareiðisdreingirnir munnu helst munga meiri eftir góðgætinum*